ítróttur

Nr. 143 • týsdagur • 2. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# GÍ átti meiri krút enn grannar

**GÍ legði meiri fyri í nærdystunum, og saknurin á leikbannaðu lyklaspælarunum hjá ÍF var ov stórur til, at fuglfirðingar kundu megna at svara aftur**

LØGMANSSTEYPIÐ FINALA
*Jóannes Hansen*

Fuglfirðingar eru framvegis sørir í kappingini um Løgmanssteypið. ÍF var ólavsøkudag fyri fyrstu ferð partur av finaluni, og hesa ferð gekk tað, sum tað gjørdi, tá ið teir í 1987 royndu seg í finaluni um Ísafjarðarsúluna. Ta ferðina vann HB, og hesa ferð vann GÍ.

Tað eru fimm ár síðani, at GÍ síðst vann sín fyrsta lut í Løgmanssteypinum. Í fyrraárið taptu teir finaluna móti B36. Hesa ferð kendist tað sum um, at tað var vinningur fyri GÍ, at nógvir av spælarunum áður høvdu roynt seg í avgerandu steypauppgerðum.

Fótbóltsspælið var soleiðis, sum tað plagar at vera í finalunum. Tað var stórur bági, at spælararnir ikki eru vanir at spæla á grasi, og tað kom ov ofta fyri, at sendingarnar ikki vóru nóg neyvar, og at bólturin ikki ferðaðist júst soleiðis, sum spælararnri tóktust rokna við, at hann fór at gera.

GÍ hevði størri tyngdi í nærdystunum, og gøtumenn vóru grammari og skjótari, tá ið stríð var um returbóltarnar.

Fuglfirðingar vóru nervaðir av, at Poul Ennigarð og serliga Bartal Eliasen sótu leikbannaðir uttanfyri. Birgir Sondum gav spælarunum loyvi til at nýta nógva styrki í nærdystunum. Gøtumenn megnaðu alla tíðina at gera nyttu av tí veruleikanum, meðan fuglfirðingar ikki fyrrenn teir í steðginum høvdu tosað saman, lyftu seg upp til størri tyngd og nærlagni í mann ímóti manni uppgerðunum.

Tað var tætt og spennandi, inntil GÍ lítla løtu undan steðginum økti til 2-0. So minkaði intensiteturin, og í fitta løtu tóktist spurningurin vera, hvussu stórur GÍ sigurin fór at verða.

Seinna partin av 2. hálvleiki spenti ÍF álopsbogan við at hava tríggjar í aftastu ketuni og fýra tríggjar í fremstu ketuni. Rúni Elttør, sum saman við Símuni Eliasen hevði verið í ÍF miðverjuni, varð fluttur fram í álopið, og átjan minuttir undan leikloki minkaði ÍF um munin.

So var tað rættuliga spennandi, og tað lá í luftini, at í hvussu so er eitt mál fór at verða skorað afturat. GÍ fekk mál, tá ið tað restaðu sjey og fimm minuttir. Harvið gjørdsist talan um 4-1 GÍ sigur. Kanska var sigurin hjá gøtumonnum ivaleysa stórur, men sum spælið myndaðist síðsta lítla tíman, so var einki at siga til, at tað var GÍ liðformaðurin, Sámal Joensen, sum tók ímóti steypinum.



*Sylla var ein støðug hóttan ímóti GÍ málinum, men Atli Gregersen hevði hann allatíðina í stuttum tjóðri*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### GÍ stóra úrtøku

Fyrsti hálvi tímin var rættuliga tættur. Nógv gekk fyri seg mitt á vøllinum, har sentralu miðvallararnir, sum skuldu mynda spælið, høvdu tað torført. Súni Olsen hjá GÍ tóktist í stóran mun at hava tankarnar í Aalborg, og hjá Høgna Zachariasen stemmaði tað ikki, sum tað ger, tá ið góðu fótbóltsevnini hjá honum koma til sín besta rætt.

Liðformenninir báðir - Sámal Joensen hjá GÍ og

## Símun var ógvuliga vónbrotin

**Dreymurin um at vinna okkurt stórt við barndómsfelagnum varð á Ólavsøku ikki til veruleika, og nú verður tað ivasamt, hvussu tað fer at verða við steypum hjá veteraninum, sum hevur vunnið nógv við HB**

ÍF
*Jóannes Hansen*

Símun Eliasen er ein av ÍF veteranunum. Fyrr í ár hevur hann fleiri ferðir verið á miðvøllinum, men hesar seinastu ferðirnar hevur hann verið í miðverjuni. Hann kom á besta liðið hjá ÍF í 1991. Síðani hevur hann verið eitt stutt skifti í KÍ og við HB hevur hann vunnið FM tvey tey seinastu árini, og í fjør var hann við til at vinna Løgmanssteypið.

- Tað hevði havt verið hugaligt at vunnið okkurt trý ár á rað, og eg hevði sera fegin viljað vunnið okkurt við ÍF, sum eg eri vaksin upp í. Men nú verður tað torført, staðfestir Símun Eliasen.

Liðfelagin hjá honum, Magni á Lakjuni, sum Símun hevur ferðast við úr Havnini og norður til Fuglafirðar til venjingar, spældi í finaluni fyri síðstu ferð í bestu deildini. Hann var fyrstu ferð á besta ÍF liðnum í 1990. Símun flutti upp í 1. deild í 1991.

- Eg veit ikki, hvussu leingi eg fari at spæla. Eg havi familju í høvuðsstaðnum, og arbeiðið krevur sítt. Fótbólts framtíðin verður tikin til viðgerðar hvørt hálvár. Eingin ivi er um, at eg fari at spæla tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum, men í løtuni dugi eg einki at siga um, hvussu tað verður næsta ár, sigur Símun Eliasen, sum ikki dylir, at hann er ógvuliga vónbrotin.

Hvussu ert tú nøgdur við avrikið í finaluni?

- Burtursæð frá fyrstu lítlu løtuni og so tá ið teir høvdu lagt seg á odda 3-1, so haldi eg, at vit fylgdu væl við teimum. Men tá ið vit síggja dystin í bakkspeglinum, so haldi eg, at gøtumenn spældu klókari enn vit gjørdu tað. Hjá okkum var tað gamla søgan, at vit ikki megnaðu at fáa nóg stóra úrtøku, og so er tað einki at ivast í, at tað kom okkum heilt illa við, at vit restaðu Poul og ikki minst Bartal, sum ofta hevur gjørt ein vørr, tá ið hann hevur verið fluttur fram í álopið.

Verður vónbrotið torført at vinna á?

- Hetta var so góði møguleikin hjá mær at vinna okkurt stórt við ÍF. Men vit mugu reisa okkum. Vit hava nógv at spæla fyri, tí longu sunnudagin verður talan um botnstríð á útivølli ímóti TB, sigur Símun Eliasen.